Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Heimleys

Spurningar:

1. Hvat verður gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá heimleysum?

2. Sambært lóg hoyrir økið til landið, men kann talan vera um samstarv millum land og kommunur at loysa trupulleikan?

Viðmerkingar:

Tað eru fleiri, sum dagliga arbeiða við heimleysum og gera sítt til at hjálpa teimum, sum eru uttan bústað. Herbergið í Havn og Gloria í Klaksvík eru tvey dømir.

Hóast hetta hoyrist, at trupulleikin við heimloysi er vaksandi, og tað eru fleiri, sum ikki hava eitt uppihald um náttina, men heldur reika ella sova úti. Fleiri yngri fólk leggjast afturat teimum heimleysu, og tað er at stúra um.

Hjá einum landi, sum brúkar so nógvar pengar uppá vælferðartænastur, ber illa til at verja støðuna, og tað átti at verið gjørligt at útvega eitt stað, har heimleys kundu sovið um næturnar.

Sambært lóg eigur landið ábyrgdina, men hetta er ein støða, sum kommunurnar og serliga størru kommunurnar helst hava ein vilja at loysa. Tí er upplagt at spyrja, um nakað samskifti ella samstarv er millum aðalráðið og kommunur at finna eina loysn uppá trupulleikan.

Á Løgtingi, 25. september 2023

Sólvit E. Nolsø